# Ung í Føroyum av bakkastokki

**Í gjár fór á triðja sinni eitt tað størsta føroyska ungdómsmentanartiltakið av bakkastokkið. Tað er stevnan Ung í Føroyum 2004 hjá Norðurlandahúsinum**

UNGDÓMSTILTAK
*Tíðindaskriv*



Ung í Føroyum er ein tvørlistarlig stevna, har føroysk ung í tríggjar dagar hittast at vísa fram egin verk, at arbeiða á listaverksmiðjum og saman framleiða eina sýning til almeningin.

Høvuðsendamálið hjá Ung í Føroyum er at skapa eitt forum, har ljós verður varpað á ungdómsmentanina og umstøður eru til tey ungu at sýna fram og menna tað listarliga virksemi, tey sjálvi eru áhugað í. Tí vísa tey á stevnuni bæði egin verk, sum tey hava framleitt undan stevnuni og tey framleiða eina sýning, har almeningurin fær høvið at síggja, hvat ungdómsmentan er, tá tey ungu sjálvi velja evni.

60 útvald arbeiða hetta vikuskiftið í listaverksmiðjum undir leiðslu av føroyskum yrkislistarfólkum. Verksmiðjurnar hesaferð verða: Tónleikur v/ Eivør Pálsdóttir, sjónleikur v/ Hans Tórgarð, skriving v/ Marionnu Debess Dahl, design v/ Svanhild Strøm, myndlist á teldu v/ Inga Joensen, dansur v/ Elsu Mariu Bærentsen.

Áhugin fyri stevnuni er alsamt vaksandi millum tey ungu. Hesaferð hava meir enn 30 verið á bíðilista, øll ung, ið høvdu fyrireika nakað at framføra. Fyri hvørja stevnu veksur talið av ungum, ið hava verk at sýna. Eisini er tað áhugavert at síggja, at hóast tað ikki er eitt krav, at verkið tú sýnir skal vera sjálvframleitt, so er hetta meira og meira so. Tey framføra t.d. heldur egnar sangir enn kend løg, og gera áhugaverdar samansetingar av fleiri listagreinum.

Fríggjakvøldið setur nýsetti mentamálaráðharrin Jógvan á Lakjuni, ið er verndari fyri Ung í Føroyum 2004, stevnuna, og síðani byrja framførslurnar hjá teimum ungu. Tað er áhugavert at síggja, hvussu tað, sum tey ungu sjálvi koma við, broytist frá ári til ár, fyri ikki at tosa um, hvussu tað veksur í nøgd. Í 2001 var knappur hálvur annar tími av framførslum, í fjør einir tveir og í ár eru ikki minni enn 31 framførslur, ið varða góðar tríggjar tímar. Hesar framførslur spenna sera vítt. Har eru ungir dreingir á scateboard, gentur við egnum mótasýningum, klassikur tónleikur er væl umboðaður og alt frá hørðum rocki til bleytar kærleiksballadur, yrkingar, stuttsøgur, nýskaptir smáfilmar og tvørlistarligar samansetingar.

Sunnudagin 15. februar kl. 17 fær almenningurin høvi at síggja úrslitið av einum intensum vikuskiftið, har arbeitt hevur verið so at siga uttan steðg um í øllum Norðurlandahúsinum. Her verða bæði pallframførslur og listaframsýning við úrslitinum av tí, verksmiðjurnar hava avrikað hesar dagarnar. Páll Danielsen og Kristianna Poulsen samskipa hesa sýning. Hvat innihaldið heilt ítøkiliga verður, vita vit av góðum grundum ikki enn, tí sum endamálið á stevnuni jú er: Tað eru tey ungu, ið avgerða hvat ungdómsmentan er.

Higartil hava vit á hvørjum árið verið bilsin um, tað støðið, ið felagssýningin hevur havt. Hetta gevur eina ábending um, hvussu stórt virkisfýsni er og hvussu stórar listagávur tey ungu hava, tá tey fáa umstøður til tess.

Atgongumerki til hesa sýning fáast í húsinum og í Kunningarstovuni.

Norðurlandahúsið skipar fyri stevnuni. Samskiparar fyri verkætlanini eru Rakel Helmsdal og Hedvig Westerlund-Kapnas.

Mentamálaráðið, Tórshavnar Býráð og Føroya Sparikassi hava stuðla og eisini hava, eins og undanfarnu ár, Margarinfabrikkin, Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Læraraskúlin veitt dyggan stuðul og stóra vælvild.

Heimasíðan hjá Norðurlandahúsinum www.nlh.fo verður alt vikuskiftið dagførd javnan. Har ber til at lesa tíðindi, reportagur og samrøður og síggja myndir frá stevnuni. Ein tíðindabólkur mannaður av trimum ungum luttakarum framleiða alt tilfarið.











# Svínoyingar vilja hava ein tunnil



*Fleiri ferðir hevur verið sagt, at vánaliga ferðasambandið til Svínoyar fer at gera enda á bygdini. Pól Sundskarð, borgarstjóri, sigur, at enn einaferð verður roynt at fáa tunnil gjørdan úr bygdini og yvir á Havnina*

**Í brævi til landsstýrismannin í samferðslumálum, Jógvan við Keldu, heitir borgarstjórin í Svínoy, Pól Sundskarð enn einaferð á landsstýrið um at ganga umsóknini hjá kommununi um ein tunnil yvir á Havnina á møti, tí hetta fer at betra um samferðslumøguleikarnar**

ÚTJAÐARI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Núverandi bygdarráðið og fyrrverandi bygdarráð í Svínoy hava fleiri ferðir sent umsóknir til Landsverkfrøðingin um at betra um samferðsluviðurskiftini á oynni. Og nú hevur núverandi borgarstjórin, Pól Sundskarð aftur gjørt vart við seg.

– Hetta bygdarráðið hevur roynt fleiri ferðir og hava nýtt nógva orku uppá hetta, umframt at onnur undan okkum eisini hava roynt, men onki ger mun. Nú seti eg mítt álit til ta nýggju samgonguna, sigur Pól Sundskarð, borgarstjóri í Svínoy.

Í brævinum sigur bygdarráðið millum annað, at við einum tunli yvir til Havnina, hevur bygdin hvønn dag samband til Hvannasunds ella Norðtoftir uppá umleið 15 minuttir við báti sum gongur 12 míl, og sostatt vildu samferðsluviðurskiftini hjá oynni verið loyst.

Havnin, sum verður umtalað her, liggur tí megin á Svínoynni, sum sást, tá tú kemur úr Norðdepilstunlinum.

Talan er um ein tunnil, ið vildi verið 1.800 metrar til longdar. Borgarstjórin í Svínoy sær fyri sær, at so hevði ein kai verðið gjørd við Havnina og ein nýggj atløgukai á Norðtoftum, har báturin hevði siglt til.




*Í Sosialinum á heysti 2002 var Regin Justinussen, svínoyingur, ikki alt ov bjartskygdur um framtíðina, tí ongin varandi loysn tykist at vera í eygsjón fyri at tryggja bygdini lív og vøkstur*

## Altíð kyrt

Í dag tekur tað um ein tíma við Másanum norður á Eiði á Svínoynni og hálvan annan tíma inn á Víkina, so tað sigur seg sjálvt, at hendan íløgan hevði havt nógv at siga fyri svínoyingar.

Borgarstjórin er sannførdur um, at tað hevði kunnað ment Svínoynna, sum so hevði kunnað komið á áleið sama støði sum Kalsoyggin er á í dag. Hann sigur, at á Havnini er altíð kyrt árið runt, so trupulleikarnir við illveðri høvdu ikki verið, um tunnilin hevði verðið gjørdur.

– Tað hevur ómetaliga nógv at siga at kunna koma skjótari fram og at kunna koma aftur og fram sama dag, sigur Pól.

Ofta hevur verið sagt, at tað er ikki Svínoynni lívi lagað við verandi samferðsluviðurskiftum, og tí tekur borgarstjórin undir við.

– Við verandi umstøðum verður tað ikki longi fyrr enn tað er øskukalt á Svínoynni, sigur hann.

Bygdarráðið í Svínoy metir, at verða hesi viðurskifti ikki fingin uppá pláss í næstu framtíð, er bygdini ikki lívi lagað, og heita tey staðiliga á Føroya Landsstýrið í brævinum um at taka hettar álvarsmál upp nú, og ikki at seta tað á eina langtíðarfíggjarætlan, tí til ta tíð er øskukalt í Svínoy.

– Sum vit áður hava ført fram, so kemur tunnilsgerðin eisini at hava alstóran týdning fyri víðari menning av nýggjum aliøkjum í Føroyum, hóast vinnan í løtuni er í einum aldudali. Við Svínoynna kunnu fáast fleiri góð aliøki við stórari útskifting á streymasjógv. Havnin yviri í Havn verður ein náttúrlig byrjan til hesar framtíðar møguleikar hjá alivinnuni, sigur bygarráðið í Svínoy at enda í brævi sínum til Jógvan við Keldu, sum er sent til Landsverkfrøðingin og Føroya Løgting eisini.





